# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Friður á jørð

Stóri jólaboðskapurin er um frið á jørð. Boðskapurin hevur verið endurtikin aftur og aftur, men tað er synd at siga, at hann hevur eyðkent heimssøguna. Orsøkin man vera tann, at tá ið tað í jólaboðskapinum verður tosað um frið á jørð, so verður eisini tosað um góðan tokka í menniskjum. Tað hevur ikki júst hevur verið góði tokkin, ið hevur ligið fremstur. Heldur hevur tað verið trongdin eftir at ala at sær og skava inn undir seg, sum hevur verið drívmegin, ið hevur verið so sterk, at ofta hevur verturin verið lagdur í, um tað hevur gingið út yvir onnur.

Kring heimin hava mong ligið órætt av hesum, og soleiðis er tað framvegis. 2009 hevur ikki verið nakað undantak. Tað eru framvegis stríð og kríggj, og tað er framvegis soleiðis, at tjóðir, felagsskapir, fyritøkur og einstaklingar ikki duga sær hógv í strembanini eftir at vinna sær vald, ríkidømi og fyrimunir. Hesum bera framvegis tjóðir og einstaklingar byrðarnar av.

Tíbetur eru tað eisini tey, sum leggja nógv fyri í royndum at linna um og stimbra. Tað gera altjóða felagsskapir, og í og út frá landi okkara eru tey eisini fleiri, sum seta nógv og alt til síðis fyri at røkja sovorðnar uppgávur og avbjóðingar kring allan heimin. Hetta eiga vit at seta stóran prís uppá!

Familjan, sosial sambond og felagsskapur hava verið styrkir, ið hava eyðkent okkara samfelag. Tað er framvegis soleiðis, at familja og vinaløg hava stóran týdning í Føroyum, og høgtíðin er gott høvi at styrkja um bondini. Tað hevði heldur ikki verið av vegnum, um vit hugsaðu um og vitjaðu tey, sum eru løgd til síðis, og sum ikki hava førleika og umstøður til sjálvi at skapa hugnan, sum vit halda er so sjálvsagdur.

Fleiri túsund føroyingar í útlegd fara komandi dagarnar aftur at seta fótin á brimbardu klettarnar, sum eru okkum so kærir. Vit eru vælsignað við friði, fólkaræði, felagsskapi og so mongum øðrum, sum onnur leingjast eftir. Tað eiga vit at seta stóran prís uppá!

Í hesum døgum hittast flestu av heimsins leiðarum í Keypmannahavn til klimaráðstevnu. Má tað verða okkara vón, at hesir leiðarar eisini taka sær góða andan í jólaevangeliinum til sín, so vit við frið og góðum tokka fáa eina góða avtala tjóðanna millum, so heiminum og okkara eftirkomarum verður lív lagað her á jørð.

**Sosialurin**

## Andstøðan melur uttanum



**HEÐIN MORTENSEN**
borgarstjóri

Í grein í bløðunum týsdagin, finst Annfinn Brekkstein, býráðslimur, at fíggjarpolitikkinum hjá meirilutanum í Tórshavnar býráð. Tað hevði verið ynskiligt, at hann sum býráðslimur setti seg betur inn í fíggjarætlanina, tí nógv av tí, hann førir fram, heldur ikki í veruleikanum.

Til dømis førir Annfinn Brekkstein fram, at kommunukassin fær tilført meira enn 30 milliónir krónur frá roknskapinum hjá Tórshavnar havn. Hetta er ikki so, tí Tórshavnar havn hevur eitt rakstraravlop upp á 23,2 milliónir, samstundis sum havnin hevur ein útreiðslupost upp á júst tað sama, 23,2 milliónir. Tískil javnvigar fíggjarætlanin hjá Tórshavnar havn og ávirkar als ikki samlaða úrslitið hjá kommununi.

Millum fremstu mál hjá sitandi býráðssamgongu, er at nøkta tørvin á ellis- og røktarheimsplássum í Suðurstreymoy. Hetta er neyðugt, tí landið hevur ikki megnað uppgávuna, og tí hava vit sett okkum fyri at byggja røktarheim til 64 fólk yviri við Strond, sum ætlandi er klárt at taka í nýtslu í 2011. Og her skal undirstrikast, at henda ætlan als ikki kundi verið framd, um ikki skattaprosentið hækkaði, og tí hevði hallið ikki verið 100 milliónir krónur í 2010, sum Annfinn Brekkstein vil vera við!

Talan er um eina íløgu, sum kemur aftur at øðrum stórum íløgum hjá kommununi, sum longu eru í gongd, og tí er neyðugt at hækka skattin, so fígging fæst til batar á eldraøkinum. Støðan er tann, at tey gomlu eru slept upp á fjall, og tí kann eg sum borgarstjóri til eina og hvørja tíð forsvara at hækka skattaprosentið fyri at byggja røktarheimið yviri við Strond.

**Vit hava spart**

Á fíggjarætlanini fyri 2009 eru spardar útivið 40 milliónir krónur, svarandi til meiri enn eitt skattaprosent. Hetta merkti, at okkara stovnar og deildir ikki fingu lønarhækkingina á heysti 2008. Tey skuldu spara hetta innaftur í 2009, umframt at raksturin varð skorin á sumri 2009. Tórshavnar kommuna hevur táttað í, men Tórshavnar kommuna skal ikki virka fyri, at samfelagið steðgar upp. Vit vísa ábyrgd, tí vit tátta í, samstundis sum vit arbeiða fyri at halda samfelagnum í gongd.

Minnilutin í býráðnum krevur sparingar í rakstrinum, men torir ikki at melda út, hvørjar hesar sparingar skuldu verið. Á sjálvum býráðsfundinum komu teir við einari skræddari kladdu, ið hevði hálvforkølaðar orðingar um at spara, men uttan at eitt orð var um, hvar sparast skuldi. Alt hetta, eftir at andstøðan í fleiri tímar saman við fyrisitingini hevur gjøgnumgingið fíggjarætlanina!

Skuldu vit arbeitt eftir tí, minnilutin mælir til, hevði Havnin ikki komið fram á leið, tí her eru bara tóm orð, uttan at nakað ítøkiligt verður sett aftanfyri. Hetta er lunkað og førir ongan veg fram!

**Lán ella ikki**

Við árslok 2010 kemur Tórshavnar kommuna at hava ein lán upp á 224 milliónir krónur, og tað er brúkt til at fíggja neyðugar íløgur í kommununi. Her skal verða undirstrikað, at tað í sjálvum sær ikki er eitt mál, um tú skalt hava lán ella ikki, tí tað veldst alt um, hvat lánið verður brúkt til. Býráðið rekur ein varnan og ábyrgdarfullan fíggjarpolitik, og fleiri rationaliseringar og umleggingar eru framdar í rakstrinum í 2009 og 2010.

Tað er av alstørsta týdningi, at átøkini ikki raka barnafamiljur og trivnaðin hjá borgarunum í kommununi. Fyri at kunna halda fram við neyðugu íløgunum á eitt nú skúla-, eldra- og umhvørvisøkinum, fer kommunan í 2010 at hækka skuldina, men framvegis er kommunan tó væl fyri fíggjarliga og megnar at svara hvørjum sítt.

## Sápuopran heldur bara fram



**TÓRBJØRN JACOBSEN**

Nú er tingmaðurin av Syðradali eisini farin í blekkhúsið. Bjørn Kalsø illneitast um, at eg ikki skal vera møttur til egnan fyrispurning miðvikudagin hin 18. november 2009. Og rætt hevur hann. Men bara partvíst, tí eg var á tingfundinum, men bráðliga varð kallað inn til fundar í uttanlandsnevnd løgtingsins, har eg eri varamaður hjá Høgna Hoydal. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevði heitt á nevndina um at koma til ráðførslu í týdningarmikla málið viðvíkjandi makrelbýtinum í strandalandaavtaluni vit eru partur av. Meðan vit sita á fundinum gerst greitt, at stundin er komin til ein fyrispurning sum eg hevði sent fiskimálaráðharranum, men hann sat jú á sama fundi, og kundi tí ikki svara. Fyrispurningurin foyktist tí burtur, táið hvørgin møtti í tingsalinum. Eftir tað kom spurningurin til Aksel Vilhelmsson um heilsutrygdarmálið, og honum tók formaður tingbólksins, Annita á Fríðriksmørk, sær av. Annars skal vísast til gerðabókina hjá Uttanlandsnevndini um rættleikan í omanfyrinevnda:

Ár 2009, ónsdagin hin 18. november, kl. 16.00, var fundur í Uttanlandsnevndini.

**Á fundi vóru:**
John Johannessen, formaður
Edmund Joensen, næstformaður
Høgni Hoydal
Jógvan á Lakjuni
Jenis av Rana
Kári á Rógvi
Anfinn Kallsberg var ikki á fundi.
Kári P. Højgaard møtti fyri Kára á Rógvi ein part av fundinum og var annars við sum eygleiðari.
**Tórbjørn Jacobsen** møtti fyri Høgna Hoydal ein part av fundinum og var annars við sum eygleiðari.
**Skrivari:**
Kristina Samuelsen

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.